## Smyril aftur í sigling

Smyril fer at røkja leiðina um Suðuroyarfjørð mikudagin 31. oktober. Fyrsta fráferðin verður úr Havn kl 13:30. Smyril fer síðan at sigla eftir ferðaætlanini, ið var galdandi áðrenn skipið fór til eftirlit. Bussleiðin í Suðroy verður broytt samsvarandi ferðaætlanini hjá Smyrli. Harvið ger St. Ola sín síðsta túr mikumorgunin kl 06 av Krambatanga til Havnar, og fer seinni út á dagin aftur til Estlands. Av Strandferðsluni takka tey ferðafólki fyri tolsemi, meðan Smyril hevur verið til eftirlit.



# gi ísbrótarin

mentanin er rík og mentanarligu tilboðini eru mong, trívast fólk betri. Tey gerast enn meira skapandi og uppfinnsom, og tað gagnar ofta vinnulívinum eisini.

### Gjøgnum upplivingar

Hon segði, at list og mentan er í sær sjálvum blivin ein vøra, ein vinna og ein marknaður.

- Londini kring okkum arbeiða hart uppá at menna seg til at vera tey mest kreativu ella skapandi londini í Evropa, har mentanarlívið kann kappast á altjóða marknaðinum, og har stórir partar av vinnulívinum vilja vera kend fyri sínar skapandi ressursur, góðu søgur og gjøgnumførdu sniðgeving. Hetta er eitt dømi um, hvussu heimurin við sjeymílafetum er á veg inn í ein búskap, har største virðiið og bestu forrætningarnar verða skaptar gjøgnum upplivingar – og har tað í størri og størri mun verður appellerað til kenslulív, lívsvirðir og samleika – við øðrum orðum til alt tað mentanarliga.

Og Elin helt fram:

- Mær er sagt, at upplivingaríðnaðurin, tá vit hugsa um umsetning, er størsta vinna í heiminum – ja, frammanfyri hernaðar-, olju- og matvøruídnaðin! Her hugsi eg um undirhalds-, mentanar-, og ferðaídnaðin – alt, sum gevur fólki upplivingar. Bæði filmar, sjónvarp, tónleikur, bløð og fjølmiðlar í heila tikið eing og sjónleikarhús, listasøvn og onnur søvn, ferðaupplivingar, wellnessídnaður, caféir, matstovur, ítróttur, teldur, telduforrit og telduspøl, lotto ella happadráttir, leikutoy og merchandise, stuttleikaparkir og mangt annað.

Stjórin í Samvit heldur einki vera til hindurs fyri, at vit í Føroyum eisini kunnu knýta mentan og vinnu meira saman og 'uppfinna' okkurt, sum kann vekja ans langt út um landoddarnar – okkurt, sum hevur við undirhald ella upplivingar at gera, okkurt spennandi ella stuttligt, góðar søgur, sum vit spinna vørur okkara inní, søgur sum hugtaka fólk.

- Tað er hetta, sum skapar umsetning, segði hon.

Elin legði aftrat, at vit eiga tilfeingið, sum er kreativa fólkið.

- Hugsa vit okkum um, hava vit í roynd og veru betri kort á hondini enn tey flestu, um vit leggja í at brúka tey. Tí, hetta landið er so íblásandi við síni fantastisku náttúru og skiftandi veðri, litum og ljósi. Hetta er kent fyri at ala fram kreativitet í fólkinum.

### Vit eru kreativ

Hon helt, at tað neyvan finst nakað land í verðini, sum hevur so nógv listarfólk og gávurík kreativ fólk í mun til íbúgvaratalið sum í Føroyum.

- Her hugsi eg ikki bara um mentanarligan kreativitet, men um uppfinnsemi í heila tikið. Tað er jú ikki bara mentanin, sum hevur einkarrætt til kreativitet, men tað er kanska serliga í mentanini, at kreativitetur sum heild hevur góðar umstøður til at verða framaldur.

Elin segði, at júst hetta er okkara fyrimunur, men legði aftrat, at vit gagnnýta kanska ikki tær styrkirnar, vit hava, nóg væl. Ikki sum er.

- Um vit skulu lyfta føroyska vinnulívið, so tað í minsta lagi kemur á hædd við vinnulívið í londum, sum vit samanbera okkum við búskaparliga – og helst enn hægri, mugu eisini vit fáa tingini til at ganga upp í eina hægri eind - mentanina og vinnuna. Skulu vit fáa ta synergiina, sum kann koma burturúr hesum og sum ofta vísir seg at skapa búskaparligan vøkstur, mugu eisini vit virðismeta mentanina og geva teimum kreativu tær bestu umstøðurnar til at vera kreativ og virkin.

Hon segði, at vit mugu skilja, hvussu mentan og vinnulív kunnu fáa gagn av hvørjum øðrum og taka stig til at tengja saman skapandi – listarligt og handilsligt – forstáilsi meira.

- Vit mugu fáa mentanarlív og vinnulív til at draga somu línu til gagns fyri báðar partar. Hetta er avgjørt ein fyritreyt fyri at fáa ein sunnan búskap og trivnað fyri øll í samfelagnum. Hetta hevur týdning, eisini tá ið ræður um fiskivinnu, oljuvinnu ella bankavinnu, sum eisini kappast um kundarnar ígjøgnum at skapa sterkan samleika í fyritøkunum, eina mentan og eitt andlit úteftir, ið hugtekur kundarnar og sum tey kunnu sameina seg við.

### Vinna og mentan

Elin Heinesen helt, at fólk í Runavíkar-økinum hava skilt nakað av hesum, tí tey hava valt at hava Mentanarviku, samstundis sum FaroeExpo fer fram.

- Tit tykjast at hava skilt, at mentan og vinna stuðla uppundir hvørt annað. Vónandi kann henda sínámillum virðingin eisini breiða seg til gerandisdagin her í økinum, so tað ikki bara hendir einaferð um árið, at vinna og mentan taka lógvatak saman, men at vit ikki gloyma – eisini dagliga – at geva teimum kreativu tær bestu umstøðurnar til at menna seg, tí tað vísir seg ofta seinni at koma tíggjufalt aftur, segði stjórin í Samvit, tá hon setti Mentanarvikuna.



*Kórið Vox Angelica, sum er ein partur av Kór Glyvra Kirkju, sang vakrar sangir við setanina*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Stóran týdning fyri føroyska vinnulívið

**Tað var ein hugnalig løta í Ítróttarhøllini í Runavík í morgun, tá altjóða vinnustevnan FaroExpo varð sett**

FAROEXPO 07

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Løtan í morgun byrjaði við, at kórið Vox Angelica, sum er mannað við átta fólkum, sang tveir vakrar sangir, ein útlendskan og ein føroyskan. Fyrsti føroyski sangurin í frostveðrinum í morgun, var »Land mítt har grasið í líðum grør«.

Eftir formellu setanina setti kórið aftur sín dám á við sínum vakra sangi.

Tað var Árni Joensen úr Oyndarfirði, ið beyð vælkomin og greiddi frá nøkrum praktiskum viðurskiftum í sambandi við stevnudagarnar.

Tá Árni hevði sagt nøkur orð og hevði kunnað luttakararnar um fundarvirksemið, kaffi og matsteðgir eins og fyrilestrarnar, sum eru í Kelduni í Skálafirði seinnapartin í dag, gav hann formanninum í Føroya Arbeiðsgevarafelag, Jóhan Páll Joensen, mykrofonina.

### Stóran týdning

Í setanarrøðu síni segði Jóhan Páll, at tað er ein heiður fyri seg – og eitt privilegium - at fáa høvi at seta FaroExpo.

Hann segði seg vóna, at tey, ið hava tikið stig til vinnustevnuna eins og tær fyritøkurnar, sum við eru, fáa nakrar góðar dagar saman.

- Hetta er ein stevna, sum gevur føroyskum fyritøkum møguleikan at fáa í lag samband og samstarv við fyritøkur úti í heimi. Endamálið hjá føroyskum fyritøkum er at hitta útlendskar fyritøkur og at hitta sínar samstarvspartar.

Hann vísti á, at styrkin við FaroExpo er, at fyritøkur undir sama taki hava høvi at tosa saman og møguliga fáa í lag samstarv.

Formaðurin í Føroya Arbeiðsgevarafelag segði, at slíkar stevnur sum hesar eru ógvuliga týdningarmiklar fyri føroyskt vinnulív, og hann segði seg vóna, at FaroExpo verður ein hornasteinur í at røkka góðum samstarvi millum fyritøkur tvørtur um landamørk.

### Fyrilestrarnir

Jóhan Páll nam eisini við áhugaverdu fyrilestrarnar, sum eru í Kelduni seinnapartin í dag og segði seg vænta, at hesir fara at geva okkum eina breiða vitan um tey evni, sum teir fara at snúgva seg um.

At enda segði hann seg vóna, at útlendsku gestirnir fáa eina positiva mynd av føroysku vinnulívi og okkara landi.

- Við hesum orðum seti eg FaroExpo 07, segði formaðurin í Føroya Arbeiðsgevarafelag.

*- Eg vóni, at FaroExpo verður ein hornasteinur í at røkka góðum samstarvi millum fyritøkur tvørtur um landamørk, segði Jóhan Páll Joensen, tá hann setti FaroExpo 07 í morgun*



*Mynd: Vilmund Jacobsen*